# Koronaleiðreglur (30.07.2020)

**UEFA Return to Play Protocol**
UEFA hevur sett í verk eina UEFA Return to Play Protocol, ið er galdandi fyri allar UEFA skrásettar dystir í 2020.

Hendan mannagongd er útgangsstøðið fyri ferðing hjá øllum landsliðum í 2020, tí verður heitt á allar venjarar og leiðarar um at leita sær kunnleika um hesa mannagondina, ið tit fáa sendandi frá Andrass Thomsem.

Í úttøkuni til leikarar hava teir fingið hesa kunningina:

**Koronaviðurskifti**
Tað er sera umráðandi, at vit øll vísa varsemi fyri at verja seg sjálvan og onnur ímóti koronasmittuni. Í samráð við koronavegleiðingina og UEFA hava við tikið støðu til, hvørji lond, ið vit meta, at vit kunnu senda okkara landslið til. Ferðast verður sum útgangsstøðið ikki til karantenulond.

Við útgangsstøðið í tí, so hava vit ásett nakrar reglur, ið koma vera galdandi í 2020:

• Um leikari áðrenn fráferð hevur verið sjúkur, er sjúkur ella følir seg illa, so er týdningarmikið, at kunnað verður um hetta sum skjótast (sjúkutekin: Fepur, ilt í hálsinum, hosti, trongd

• Leikarar skulu brúka andlitsmaskur, tá ferðast verður (leikarar fáa hesar útflýggjaðar frá FSF),

• Foreldur o.a. eiga ikki ferðast til dystir uttanlands,

• Leikarar skulu vera á hotellinum, tá venjing, dystur o.l. ikki er á skránni,

• Leikarar hava ikki loyvi at vitja støð, har nógv fólk vanliga hittast, td. shoppingcentur, tivoli, strendur,

• Leikarar skulu vísa varðsemi og fylgja øllum boðum, ið koma frá ferðaleiðaranum.